# Flogfar fór í havið




Bjargingarlið hava funnið fleiri lík á staðnum, har eitt jemenskt flogfar datt niður við Comor-oyggjarnar tíðliga í morgun. Líkini eru funnin stutt frá landi, men myndugleikarnir á Comor-oyggjunum siga, at enn er ov tíðliga at siga, um tey stava frá flogfarinum ella ikki. Jemenska flogfarið, sum var av slagnum Airbus 310-300, datt niður í havið nærhendis Comor-oyggjunum eitt korter, áðrenn tað eftir ætlanini skuldi lenda. Flogfarið kom úr París og hevði millumlent í Jemen. 142 ferðafólk vóru við flogfarinum, og manningin taldi 11. Fyribilsupplýsingar siga, at ferðafólkini vóru úr Fraklandi og Comor-oyggjunum, sum eru í Indiska Havinum. Orsøkin til vanlukkuna er ikki greið enn, men veðrið á leiðini var vánaligt.

# Aftur jarðskjálvti í Sichuan

Ein jarðskjálvti hevur verið í kinesiska landspartinum Sinchuan. Skjálvtin var 5,6 á Richterstiganum, men sambært myndugleikunum kravdi hann ikki mannalív. Hinvegin eru umleið 9.000 hús oyðiløgd, og vega- og telefonsambandið er farið. Í fjør var ein ógvusligur jarðskjálvti í sama øki, og tá doyðu næstan 90.000 fólk, og fimm milliónir mistu hús og heim. Í síðstu viku kunngjørdi stjórnin eina frágreiðing, har tað kom fram, at arbeiðið at endurreisa tað, sum fór í jarðskjálvtanum í Sinchuan í fjør, gongur ikki eftir ætlanini, tí trupulleikar eru við figgingini.

# drotning Elizabeth

hesi børnini, ið nú eisini eru stødd í Avstralia, USA, Kanada og Føroyum.

- Tað hevur verið lýst eftir hesum børnum í skotsku bløðunum. Hetta hevur onkur av teimum, sum vit arbeiddu saman við tá vit búðu í Skotlandi sæð, og sendu mær ein meyl, at skotsku myndugleikarnir leitaðu eftir Karitu Mariu, greiðir Jógvan Zachariassen frá.

Síðan settu tey seg í samband við skotsku myndugleikarnar at greiða frá, hvar tey vóru. Tey hava so fingið eitt kongaliga innsiglað bræv, har tey eru boðin til Skotlands at hátíðarhalda 10 ára føðingardagin saman við skotska parlamentinum.



*Queen Elizabeth II of the United Kingdom fer í morgin at heilsa upp á Karitu Mariu, ið verður í føroyska tjóðarbúnanum*

*mynd:NASA/Bill Ingalls*

### Í føroyskum búna

Tað er í morgin, at tann stóri 10 ára føðingardagurin verður. Og dagurin byrjar við at børnini sleppa at heilsa upp á drotningina í Skotlandi, Queen Elizabeth II of the United Kingdom, og skotsku tinglimirnar.

Men tað eru bara børnini, ið sleppa at hitta drotningina. Foreldrini sleppa at sita í einum rúmi við síðuna av og fylgja við á stórskíggja.

Ein stórur spurningur, tá tú skal í gildi við drotningini av Bretlandi er, hvussu dresskodan er og hvørjum hon skal vera í. Men tann spurningurin var skjótt svaraður fyri Karitu Mariu. Hon verður nevniliga í føroyska tjóðarbúnanum, tá hon skal hitta drotningina.

Børnini úr Skotlandi verða eisini í tjóðarbúnanum.

Sjálv greiðir Karita Maria frá, at hon er sera spent upp á at sleppa at møta drotningina og at sleppa at halda 10 ára føðingardag saman við hinum 162 børnunum í Skotlandi. Tað er eisini ein spennandi skrá, sum er sett upp til tey at uppliva henda stóra dagin, sum verður hildin í skotska parlamentinum í Edinburgh.





*Karita Maria við kongaligu gullmyntini, ið hon hevur fingið. Á myntini stendur: »To Commemorate the opening of the Scottish Parliament 1 July 1999«. Bert 162 myntir av sama slag eru til*

*Karita Maria saman við foreldrunum Unn og Jógvan*

SP/F HJÁLPIRÓT
Urtagarðsvirksemi
Góð mold til sølu
Sorterað, sandblandað mold
til sølu fyri 325 kr./m³
Hjálpirót Sp/f · Boks 1286
FO-110-Tórshavn · Tlf: 316505 / 516505

BALLUPRESSUR
FÁIÐ SLÁTTURIN SKJÓTT
OG VÆL FRÁ HONDINI
Plast av allar hægstu dygd og net serframleitt til okkara pressur



■ Betri fóður
■ Skjótari liðugt
■ Lætt at handfara
Triv
Heygsvegur 30 · FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 69 10 · Fax 31 69 10
T-postur: triv@post.olivant.fo

SLÁIMASKINUR
IÐ SLÁA ALT
■ 2+2 gear ella 6+2 gear (báðar vegir)
■ Prísir frá kr. 16.350 til 31.000



Knívar í ymiskum støddum frá 71 til 148 cm
Triv
Heygsvegur 30 · FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 69 10 · Fax 31 69 10
T-postur: triv@post.olivant.fo